# ítróttur

Nr. 232 • fríggjadagur • 5. desmber 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Henrik fer ongan veg

**Í donskum miðlum hevur ljóðað, at Henrik Larsen hevur søkt leysa venjarastarvið hjá Partick Thistle, men hetta avsannar landsliðsvenjarin avgjørdur.**



*Henrik Larsen sigur seg ongar ætlanir hava um at leita sær starv í Skotlandi*

LANDSLIÐSVENJARIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein heldur kløkkur føroyskur landsliðsvenjari, sum Sosialurin fekk orðið á hósmorgunin. Sjálvur hevði hann annars verið í ferð við at gera seg til reiðar at fara til Frankfurt, har hann saman við FSF-ummboðunum skal fylgja lutakastinum, tá hann varð kunnaður um tíðindi á fótbóltsheimasíðuni, bold.dk. Har stóð nevnliga at lesa, at Henrik Larsen var millum teirra, sum hava søkt um leysa venjarastarvið hjá Partick Thistle í Skotlandi.

– Ja, hatta havi eg júst hoyrt sjálvur. Ein annar blaðmaður ringdi her fyri løtu síðani, og tá visti eg so slettis einki. Og lat meg beinan vegin siga, at hatta havi eg so einki við at gera. Eg havi so eisini ringt til teir, sum standa fyri bold.dk., og biðið teir gera so væl at avsanna hasi tíðindini.

– Um tað bara eru lótir frá felagnum, soleiðis at teir á hendan hátt kunnu skapa áhuga fyri starvinum, dugi eg ikki at isga, tað leggi eg sum so heldur ikki í, sigur hann. Og leggur so flennandi afturat, at tað kanska er svenski Henrik Larsson, sum leitar sær arbeiði.

## Gjarna Skotland

Tá eitt sindur meira av álvara aftur kemur í orðini, fer tosið tó at snúgva seg um komandi lutakastið, og her tykist Henrik at vera ein spentur maður.

– Tað er jú ikki líka mikið, hvussu bólkurin verður settur saman, so sjálvandi eri eg eins spentur og øll onnur.

Spurdur, hvørt hann hevur nøkur serlig ynski til lutakastið, sigur venjarin, at tað hevur hann sjálvandi.

– Skotland vil eg sjálvsagt gjarna hava í okkara part, men annars eru jú eisini aðrir spennandi møguleikar. Høvdu vit fingið okkurt av teimum heilt stóru, sum kunnu fylla stadion her hjá okkum, so vildi tað verið stuttligt, og so kanska okkurt norðurland eisini. Svøríki ella Noreg høvdu ikki verið so galin. Og eru vit heppin, so fáa vi kanska eisini tveir dystir móti Luxemburg…

– Tað einasta, eg vil sleppa undan, er, at vit fáa for nógv eystanlond. Fíggjarliga eru tey einki serlig, og ítróttarliga eru tey ofta tung at fáast við. Føroyar hava eisini ringar royndir av ferðunum eystureftir, og sum spælari minnist eg eisini, at tað ofta var sera trupult at fáa nakað sum helst burtur úr teimum dystunum. Men nú fáa vit at síggja. Vit eru jú ikki sjálvir harrar yvir, hvussu tað fer at ganga, so tað er bara at vóna tað besta, sigur landsliðsvenjarin at enda.

# Dráttur misti takið

**ÍF tók alt, tá tær vitjaði á Giljanesi**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein dystur í meistaradeildini hjá kvinnum varð leiktur í gjárkvøldið. Hetta var á Giljanesi, har Drátur hevði vitjan av ÍF.

Seinasta vikuskiftið vann Dráttur útidystin á júst ÍF, og ein endurtøka av sigrinum vildi lyft Drátt næstan upp undir liðina á oddaliðunum báðum, TB og Mjølnir.

Men hvussu var og ikki, so eydnaðist hetta ikki. ÍF vann nevnliga dystin 3-1, og tó at tað ikki flutti tær av 5. plássinum í deildini, so eru tær nú bert tvey stig aftan fyri Dráttur og KÍF, sum eru ájavnar í triðja plássinum.

## Meistaradeild, kvinnur

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 8 | 6 | - | 2 | 21 | 6 | 15 | 12 |
| 2 Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 19 | 9 | 10 | 12 |
| 3 Dráttur | 8 | 4 | - | 4 | 17 | 15 | 2 | 8 |
| 4 KÍF | 8 | 4 | - | 4 | 14 | 17 | -3 | 8 |
| 5 ÍF | 8 | 3 | - | 5 | 10 | 16 | -6 | 6 |
| 6 Fleyr | 8 | 1 | - | 7 | 5 | 23 | -18 | 2 |



# Tað er langt millum dreymin og marruna

**Broyttar mannagongdir til undankappingina hava viðført, at munurin millum eitt gott og eitt vánaligt lutakst er vorðin enn størri. So í FSF sita helst øll og krossa fingrar, tá HM-lutakastið verður seinnapartin fríggjadagin**




*Fíggjarliga vildi tað verið ein ynskistøða, um eitt nú Italia kom í bólki við okkum hesaferð*
*Mynd: Reuters*

LUTAKAST TIL HM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Klokkan fimm seinnapartin í dag verður lutur kastaður um, hvussu tær 51 europeisku fótbóltstjóðirnar skulu flokkast, tá ið tær næsta heyst og í 2005 fara at telvast um tey trettan plássini, sum UEFA limalondini eiga í HM endaspælinum, sum á sumri í 2006 verður í Týsklandi. Vertirnir eru sjálvskrivaðir luttakarar, og tí verður tað ikki hesa ferð møguleiki hjá Føroyum at enda í bólki saman við týskarunum, sum í júst loknu EM undankappingini vóru orsøk til, at FSF fekk eyka inntøku uppá átta milliónir krónur. Tað var í hvussu so er metingin hjá Fótbóltssambandinum.

UEFA londini skulu flokkast í átta bólkar. Í fimm bólkum verður luttakaratalið seks, og í trimum bólkum verður luttøkutalið átta.

Undan lutakastinum eru tær 51 tjóðirnar styrkismettar út frá, hvussu tær hava staðið seg í síðstu EM og HM undankappingunum. Styrkismetingin framgongur aðrastaðni her á síðuni.

Tað skal annars viðmerkjast, at mannagongdirnar í ár eru broyttar nakað.

Ætlanin er nevnliga, at tey fýra sterkastu londini ikki skulu í bólk við sjey londum. Helst er hetta gjørt eftir trýsti frá stóru tjóðunum, sum vilja sleppa undan ov nógvum »løttum« dystum, men tað er einki at ivast í, at tað er smeitur fyri minni liðini. Ikki minst fyri tey trý lægst mettu á styrkislistanum.

Men eisini fyri Føroyar ger hetta ein veldugan mun. Ein bólkur við sjey londum merkir nevnliga eyka útreiðslur, og hesar eykaútreiðslur koma soleiðis, uttan at møguligar eyka inntøkur frá teimum heilt stóru londunum eru við í pottinum. Londini, sum sleppa undan teimum trimum veikastu eru Frakland, Italia, Ongland og Spania.

## Dreymurin

Eingin ivi er um, at tað bæði ítróttarliga og fíggjarliga hevði verið framúr lutakast, um Føroyar høvdu fingið eitt av stóru vestureuropeisku fótbóltstjóðunum í sín bólk – bæði úr fyrsta og øðrum raði. Um lutakastið fellur so væl, sum tað kann bara er loyvt at droyma um, so verður mótstøðuliðið í bólki eitt England og úr bólki tvey Holland. Hetta hevði havt við sær, at stóru stjørnurnar, sum fleiri ferðir um vikuna umboða stórfeløg í Onglandi, Hollandi og Spania, høvdu spælt í Føroyum. Tað hevði havt sera stórar inntøkur fyri sjónvarpsrættindini, og tað hevði uttan iva havt við sær, at tað høvdu verið rættuliga nógvir áskoðarar til hesar dystirnar.

Umframt England og Holland hevði tað neyvan bilað nakað, um luturin í staðin fall á Frakland ella Italia úr ovasta raðnum, og at landið úr næstovasta raðnum varð Danmark.

Føroyar og Skotland hava verið í bólki saman í trimum undankappingum, og úr triðja raðnum hesa ferð man Skotland vera besta boðið. Úr fjórða raðnum eru fleiri norðurlendskir møguleikar, og tað hevði einki gjørt, um Ísland enn eina ferð kom í bólk saman við Føroyum.

Úr fimta raðnum man Kypros, sum Føroyar í 1992 og í 1993 taptu ímóti ávíkavíst á heimavølli og útivølli, vera besta boðið. Fyri Føroyar hevði tað komið væl við at komið í ein av stóru bólkunum.

Gamli venjarin hjá Føroyum, Allan Simonsen, er framvegis venjari hjá Luksemborg, og tað hevði einki gjørt, um høvi varð aftur at stríðast við Luksemborg. Føroyar vunnu báðar undankappingardystirnar ímóti teimum í 2001.

Var talan um slíkar broytingar í UEFA-høpi, so er einki at ivast í, at smæstu londini høvdu fingið eina fíggjarliga kompensatión fyri hetta sosialt skeiva býtið. Men tað verður so neyvan talan um her. HM-kappingin er í FIFA-høpi, og altjóða fótbóltssamgongan er als ikki eins múgvandi og tann europeiska.

## Marran

Ítróttarliga, fíggjarliga og umsitingarliga er talan um stóran mun millum dreyma mótstøðuliðini, sum eru nevnd omanfyri, og so møguleikan, sum spøkir fyri fátøkum eystureuropeiskum fótbóltstjóðum, sum á landsliðunum hava spælarar, ið ikki eru so kendir á okkara leiðum, og sum tað málsliga og á annan fyrisitingarligan hátt er hópin torførari at samskifta við, enn tað er við grannatjóðirnar og aðrar vestureuropeiskar tjóðir.

Marran úr fyrsta raðnum er Kekkia, sum Føroyar tríggjar ferðir áður hava verið í undankappingarbólki saman við. Hóast Turkaland telist millum tær frægu fótbóltstjóðirnar – menningin hevur verið framúr síðani teir í 1991 spældu 1–1 ímóti Føroyum í Gundadali – so fer tað at kennast sum ikki sørt vónbrot at koma í bólk saman við teimum. Umstøðurnar í Turkalandi eru ikki serliga støðugar, og hóast talan er um fólkaríkt land, so er talan ikki um serliga fíggjarliga styrki. Portugal er ein møguleiki, men tá hevði tað verið frægari fyri fyrstu ferð nakrantíð at komið í bólk við Svøríki.

Úr næstovasta raðnum verður tað sera torført at sigla rundanum eystureuropeisku skerðini: Kroatia, Pólland, Slovenia og Russland, og í triðja raðnum eru so at siga gráu og ytru møguleikarnir eins nógvir og teir litríku og nærru. Her verður hugsað um Rumenia, Bulgaria, Slovakia og Serbia/Montenegro. Í fjórða raðnum er møguleiki at renna seg í Ukreina, Letland og Bosnia/Montenegro og í fimta raðnum ber tað næstan ikki til at sleppa undan Eysturevropa: Georgia, Ungarn, Hvítarussland, Estland, Litava og Makedonia.

Føroyar eru í sama raði sum Aserbadjan, Moldova, Armenia og Albania, so teimum slepst undan.

## Føroysk umboð

Lutakastið verður klokkan fimm seinnapartin í dag. Tað fer ivaleyst at bera til at fylgja við á fleiri sjónvarpsrásum. Umboð fyri FSF vera á staðnum. Tað plagar at vera soleiðis, at umboð fyri tjóðirnar, sum verða flokkaðar í bólk saman, heilsa upp á hvønn annan og gera av, nær og hvar fundirin skal vera, har greiða skal fáast á skránna fyri undankappingina.

Um tað ger at ganga, sum føroyingar fegnir vilja og droyma um, so fer okkara bólkur at síggja soleiðis út: England, Holland, Skotland, Ísland, Kypros, Føroyar og Luksemborg. Um talan verður um sannan marrubólk, so fer hann at síggja soleiðis út: Kekkia, Kroatia, Bulgaria, Ukreina, Georgia og Føroyar.

Tað kann ikki sigast annað, enn at tað er stórur munur á dreyminum og marruni!

## Styrkismetingin

**Tríggir bólkar hava sjey lið, og fimm bólkar hava seks lið. Lið úr sama raði eru ikki í bólki saman. Frakland, Ongland, Italia og Spania eru vissað um, at tey koma í bólk við seks liðum**

**Rað 1**
Frakland, Portugal, Svøríki, Kekkia, Spania, Italia, England og Turkaland.
**Rað 2**
Holland, Kroatia, Belgia, Danmark, Russland, Írland, Slovenia og Pólland.
**Rað 3**
Bulgaria, Rumeniea, Skotland, Serbia/Montenegro, Sveis, Grikkaland, Slovakia og Eysturríki.
**Rað 4**
Ukreina, Ísland, Finnland, Noreg, Ísrael, Bosnia/Hersegovina, Letland og Wales.
**Rað 5**
Ungarn, Georgia, Hvítarussland, Kypros, Estland, Norðuírland, Litava og Makedonia.
**Rað 6**
Albania, Armenia, Moldova, Aserbadjan, Føroyar, Malta, San Marino og Liktinstein.
**Rað 7**
Andorra, Luksemborg og Kasakhstan.